## Klumman



**Inna Tornroos**
inna@sosialurin.fo

### Hetta var Óli, nú kemur Mia«

Hendan setningin hava allarflestu føroyingar óivað hoyrt mangar ferðir, tá tað nærkast jólum!

Jólaheilsanir í Útvarpi Føroya eru eitt líka víst tekin um at jólini nærkast, sum Cadbury eskjurnar í handlinum eru!

At hendan siðvenja livir er løgið, nú sambandið millum Føroyar og umverðina er so gott, og tey flestu kunnu hoyrast hvønn dag um ein so vil. Men eg trúgvi, at tey flestu kunnu verða samd um, at tað er nakað serligt at fáa eina jólaheilsan úr útvarpinum.

Í fleiri á havi eg havt ábyrgdina av, at jólaheilsanirnar úr Stockholm verða varpaðar til familju og vinir í Føroyum.

Vit stíla fyri veitslu í sambandi við, at heilsanirnar skulu inn á band og eta dunnu og annan føroyskan jólamat, og onkutíð hava við eitt sokallað svenskt "knytkalas" har øll taka okkurt við.

Tá so etið er, og hýrurin er góður, er tíðin komin til jólaheilsanirnar.

Tey djørvu, og oftani tey sum hava teir longstu listarnar, koma fyrst inn í stovuna ella kamarið, har eg siti við mínum bandupptakara!

"Gott kvøld føroya fólk" - soleiðis byrja mannfólkini ofta! Haldi ikki at eg nakrantíð havi hoyrt eina kvinnu heilsa øllum føroya fólki nakað enn. Tær koma oftani inn við nøkrum "post-it" lepum og lesa stutt og greitt heilsanina til familju og vinir.

Stuttligast er sjálvandi, tá børnini eru við. Tey eru oftani so spent at orðini nærum rapla úr munninum, og ilt er at skilja, hvat tey siga. Helst skal jú málið eisini vera føroyskt, og tað er ikki teirra móðurmál.

Og við børninum kemur sangurin - "Nu tændas tusen juleljus..." er ein favorittur. Summi syngja solo, og onkuntíð hava vit roynt at gjørt eitt lítið føroyskt barnakór, sum vit hildu sungu so pent. Men tá eg tosaði við familjuna heima, vildu tey vita, hvør tað var sum skrálaði í útvarpinum...

Tárini renna eisini, tá hugsað verður um tey har heima. Eitt árið var tað ein mamma sum longdist sera illa og royndi fleiri ferðir at lesa heilsanir, men tað miseyðnaðist hvørja ferð! At enda tók dóttirin, sum var sjey ár, yvir og las heilsaninar til ommu og abba inn.

Jólaheilsaninar, trúgvi eg, eru ein siðvenja, vit føroyingar bæði heima og uttanlands vilja varðveita.

"Hetta var Inna, nú koma jólini..."

# Mín jólabók er ein jólakalendari




## Ummæli



**Oddfríður Marni Rasmussen**

Hetta er aðru ferð, at Bókadeild Føroya lærarafelags gevur út Mína jólabók í nýggjum hami. Sigast kann, at hetta ummælið kemur heldur seint, tí at bókin er sett upp sum ein jólakalendari, har ein søga, tekning, yrking ella ein kreativ uppgáva er fyri hvønn dag í desember, men hóast tað, so haldi eg, at hon eigur at verða umrødd.

Við at eygbera hana leysliga, sæst tíðiliga, at hetta er ein ótrúliga snøgg bók. Nógvar góðar, litríkar og fangandi myndir eru í bókini. Myndirnar hava nógvir ymiskir teknarar greitt úr hondum. Tað er eisini ymiskt, hvussu góðar tær eru. Um eg skal taka ein fram um hinar, so er Janus á Húsagarði óførur. Hann er sera nágreiniligur og teknar heilt niður í smálutirnar. Nógvar av tekningunum hava tað sama við sær, sum Waldo bøkurnar. Hóast góðskan er ymisk, so passa tekningarnar væl til søgurnar í bókini. Tað er eitt sindur óheppi, at tekningarnar til onkra søgu ikki megna at tekna persónarnar soleiðis, at teir líkjast í øllum tekningunum, sum hoyra til søguna.

Mín jólabók hevur eina lítla søgu til hvønn sunnudag í advent. Søgurnar hevur Gitte Klein skrivað. Hetta eru fýra fittar søgur um ein drong og ein dølskan pápa, sum ikki lurtar eftir soninum, men sum má sanna, at hann átti at havt lurtað eftir honum. Søgurnar eru skemtiligar í støðum og vit vaksnu kenna okkum aftur í støðunum, men eg sakni eina mammu – har er ongin mamma og hon verður ikki nevnd við einum orði. Um talan var um ein einligan pápa, so átti mamman um ikki annað verði nevnd sum ein, ið hann saknar, tá ið alt endar galið.

Hinar stuttsøgurnar eru ymiskar í dygd. Summar eru heilt góðar. Tann hjá Steintóri Rasmussen er góð. Hetta er ein krimi søga um eina gentu og ein drong, sum finna ein lykil á vegnum, og tey varnast, at lykilin eigur ein eftirlýstur brótsmaður og sjálvandi fanga tey hann. So eru eisini aðrar søgur, sum eru í so moraliserandi. Til dømis hon eftir Elin Mortensen, ið er um ein drong, sum verður happaður, tí at annað beinið er stytri en hitt. Hann verður sendur niður og skaðin verður rættaður so væl, at drongurin gerst góður svimjari og tískil ikki happaður aftur.

Søgan hjá Sólrún Michelsen er góð sjálvt um har er ein avísur pensláður moralur í henni. Hon er um hesar vætrarnar, sum velja út bleytar pakkar til børnini, ið skikka sær ov illa. Teir avgera at geva Pæturi, sum er høvuðspersónurin, hosur og undirbuksur í jólagávu, tí at hann plágar mammuna og pápan um at fáa eina farteldu í jólagávu. Hann brýtur sparigrísin hjá sær, tekur pengarnar og ætlar at keypa sær eina farteldu fyri teir, men í sølumiðstøðini hoyrir hann nøkur børn ynskja sær ymiskt, sum hann sjálvur eigur, og varnast tískil, at hann eigur so ómetaliga nógv, sum hini ikki eiga. Hann velur heldur at keypa hesum fátæku børnunum tað, sum tey ynskja sær í jólagávu og so kunnu tit ætla, hvat hann sjálvur fær í jólagávu, nú hann hevur skikkað sær so væl. Moralurin í hesari søguni er ikki so eyðsýndur og áloypandi sum í fyrrnevndu søgu. Mina Reinert hevur skrivað eina og Rakel Helmsdal hevur skrivað eina, Sólbjørn Fríði Olsen og Beinta Johannesen hava eisini skrivað hvør sína. Eg fari ikki her at avdúkja allar, men hugaligt er at lesa um Lítla Gutta, sum Marius Johannesen las upp í sjónvarpinum fyri okkurt um 20 árum síðani. Eg lúgvi ikki, tá ið eg sigi, at eg hoyrdi Marius fyri mær, tá ið eg las hana.

Í mínari jólabók 2007 eru bara tvær yrkingar og tað haldi eg er alt ov lítið. Tað kann vera, at tað er ringt at fáa fólk at yrkja til slíkar bøkur, nei, líka veit eg. Fyrru hevur Poulina Slættanes skrivað, og er hon ein fittlig yrking um at fáa Mína jólabók í hondina. Alexandur Kristiansen hevur yrkt hina. Vit kenna hansara stíl og henda yrkingin er ikki øðrvísi.

Nógvir dagar í jólakalendaranum hava ymiskar uppgávur ella ítriv, sum sperda húskið kann takast við um jóltíðir. Jólatíðin fær fólk at seta ferðina enn meira upp, og tí er tað sera gott at seta seg saman við børnunum at klippa og baka køkur til jóla.

Mín Jólabók 2007 er tann mest spennandi jólakalendarin, sum eg havi sætt. Innihaldið er til børn og ung og strongd foreldur, og tað er heilt víst, at bæði foreldur og børn hava brúk fyri einari slíkari bók, sum veruliga fær lesaran at hugsa um, hví vit halda jól, og sum fær fólk at minka um ferðina.




*Ein av søgunum úr »Mín jólabók«*

Sosialurin